# VIKULIÐIÐ

vodafone deildin VIKA 42




Uppstilling: **4-4-2**

# Neistin buldrar víðari

**HONDBÓLTUR** Verandi greipuvinnararnir hava framvegis fult stigatal. Neistin vann á VÍF í gjár



Uni Holm Johannesen

Úrslitið var 36-28.

Ungu vestmenningarnir togaðust leingi við heimaliðið, og munurin var ikki serliga stórur.

Støðan í hálvleikinum var 16-14.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki skrædnaði millum liðini. Neistin setti ferðina upp.

Greipuvinnararnir hava stóra breidd, og tað varð prógvað í gjár. Heini Hanusarson og Ári Dam sótu uttan fyri í stórum løtum av seinna hálvleiki, men tað gjørdi ikki petti.

Áki Mørk er so smátt komin fyri seg aftaná skaða, og hann skeyt fimm av málunum í gjár.

Neistin hevur vunnið sínar fimm landskappingardystir higartil.

**Neistin - VÍF** 36-28 (16-14)

Dómarar: Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

**10 min.: 6-4**
**20 min.: 10-10**
**40 min.: 19-17**
**50 min.: 27-23**

**Neistin:** Jón Ludvík 8, Heini Hanusarson 6 (2), Áki Mørk 5, Finnur Hansson 5, David Edvardsen 4, Ingi Olsen 3, Sjúrður Thomassen 3, Jákup Apol 1, Rósing Rasmussen 1.
**VÍF:** Áki G. Olsen 9 (3), Bjarti Hansen 4, Sámal Jákup Djurhuus 4, Magnus Muller 3, Joen Pauli Høgnesen 2, Magnus á Rógvi 2, Niels Andreasen 1, Jákup Soni Andreasen 1, Jákup Andreas Joensen 1.
Útvísingar: Neistin 5 - VÍF 2

# Brauer skeyt 10 mál hesaferð

**HONDBÓLTUR** Barbara Brauer, Neistin, hevur skotið eina rúgvu av málum higartil í landskappingini. Í gjár skeyt hon 10 av málunum, tá VÍF tapti í høllini á Hálsi

Uni Holm Johannesen



Neistin greiddi sína skyldu. Bláu havnargenturnar vilja fegnar bjóða ovastu liðunum av, og sigurin á Tjaldrinum í farnu viku staðfesti, at tær eru førar fyri tí.

Nú vann Neistin 30-23 á VÍF. Hálvleiksstøðan var 15-12.

Barbara Brauer var aftur mest eyðsýnd hesaferð, og hon var toppskjútti.

Áðrenn kvinnurnar úr Vestmanna fingu fótin fyri seg, var heimaliðið á odda 7-1. Tá vóru gott og væl 10 minuttir spældi.

Gestirnir komu ongantíð aftur, og tí var leiðslan ongantíð í vanda.

**Neistin - VÍF** 30-23 (15-12)

Dómarar: Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen

**10 min.: 7-2**
**20 min.: 11-8**
**40 min.: 19-14**
**50 min.: 25-17**

**Neistin:** Barbara Brauer 10 (3), Jacklin Djurhuus 5, Bára Hansen 3 (2), Elin Holm 3, Birita Wardum 3, Katrin á Neystabø 2, Marjun Danberg 2, Rakul Magnussen 1.
**VÍF:** Liljan Djurhuus 6 (5), Agnar Olsen 6, Tóra Seloy 3, Elisa Leo 2, Rakul Joensen 2, Torgunn Johansen 2, Marita á Rógvi 1.
Útvísingar: Neistin 2 - VÍF 3

# Fleyr vann greitt

**FLOGBÓLTUR** Ein dystur var í bestu kvinnudeildini í gjár. Fleyr vann 3-0 á KÍF

Uni Holm Johannesen

Kvinnuliðið úr Kollafirði hava framvegis síni fyrstu stig til góðar, og Fleyr er á ovasta plássinum aftaná tveir landskappingardystir.

Sigurin var ongantíð í vanda í gjár. Settúrslitini vóru 25-17, 25-17 og 25-21.

Fýra dystir verða um vikuskiftið.

Mjølnir - ÍF og SÍ - Ternan verða avgreiddir leygardagin, og Fleyr - Dráttur og TB - KÍF spæla sunnudagin.




*Myndir: Álvur Haraldsen*